# AMERIKANSKUR JÓHAN Í KOLLAFIRÐI

You're Pitifull eitur nýggjasta lagið hjá hermaranum Weird Al Yankovic, ið er eitt slag av amerikanskari útgávuav Jóhan í Kollafirði. You're Pitifull er ein parodi av lagnum You're Beautiful hjá James Blunt, og kann gerast enn eitt hitt hjá festliga amerikumanninum. Lagið er sum altíð meistarliga gjørt, og hann dugir ómetaliga væl at herma eftir røddini hjá James Blunt. Enn er ikki greitt hvat James Blunt heldur um lagið

Weird Al Yankovic hevur síðan miðskeiðis í 80'árunum givið 21 útgávur út. Hann hevur nærum øll árini verið millum heimsins best umtóktu tónlistarligu hermarar, við hittløgum sum I'm Fat, Smells Like Nirvana, Like A Surgeon, Amish Paradise og nógvum øðrum. Weird Al hevur altíð tulkað størstu hittini, meðan tey vóru hitt. Á nýggjastu fløguni Poodle Hat, verða m.o. Eminem, Nelly, Avril Lavigne, Backstreet Boys og Billy Joel tulkaði.



*James Blunt hevur enn ikki sagt, hvat hann heldur um útgávuna hjá Weird Al av hansara hittlagi.*



*Weird All Yankovic syngur m.a. you're pitiful, it's true. Never had a date that you couldn't inflate...*

## HITLIST

### 15 tær bestu

ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Teitur | Louis Louis |
| 2 | Lordi | Hard Rock Halleluja |
| 3 | Red Hot Chili Peppers | Dani California |
| 4 | Høgni Lisberg | Just Dig |
| 5 | The Rasmus | Sail Away |
| 6 | Shakira ft. Wyclef Jean | Hips Don't Lie |
| 7 | Mary J Blige & U2 | One |
| 8 | Robbie Williams | Sin, Sin, Sin |
| 9 | Mew | The Zookeeper's Boy |
| 10 | The Story Ends | Dancing Around Honululu |
| 11 | Eminem ft. Nate Dogg | Shake That |
| 12 | The Pussyc.Dolls ft. Big Snoop D. | Buttons |
| 13 | Muse | Supermassive Black Hole |
| 14 | High Hat feat Heiðrik | Rasputin |
| 15 | Gnarls Barkley | Crazy |

### Tjeklisten

DR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Lordi | Hard Rock Halleluja |
| 2 | Gnarls Barkley | Crazy |
| 3 | Red Hot Chili Peppers | Dani California |
| 4 | Shakira ft. Wyclef Jean | Hips Don't Lie |
| 5 | Kashmir | She's Made Of Chalk |
| 6 | Infernal | Ten Miles |
| 7 | Rasmus Nøhr | Sommer I Europa |
| 8 | Nordstrøm | Berlin |
| 9 | Coldplay | The Hardest Part |
| 10 | Madonna | Get It Together |
| 11 | Sidsel Ben Semmane | Twist Of Love |
| 12 | Raconteurs | Steady, As She Goes |
| 13 | Robbie Williams | Sin, Sin, Sin |
| 14 | Juanes | La Camisa Negra |
| 15 | James Blunt | Wiseman |
| 16 | Mew | Why Are You Looking Grave |
| 17 | Nelly Furtado | Maneater |
| 18 | Pink | Who Knew |
| 19 | Peter Sommer | 8-6-6-0 |
| 20 | L.O.C. | Du gør mig |

### Top of the Pops

BBC

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nelly Furtado | Maneater |
| 2 | Sandi Thom | I Wish I Was A Punk Rocker |
| 3 | Embrace | World At Your Feet |
| 4 | The Automatic | Monster |
| 5 | Gnarls Barkley | Grazy |
| 6 | Infernal | From Paris To Berlin |
| 7 | Pink | Who Knew |
| 8 | Tony Christie | The Wold Cup |
| 9 | Keane | Is It Any Wonder |
| 10 | Badiel, Skinner, The L.S. | 3 Lions |
| 11 | Crazy Frog | We Are The Champions |
| 12 | Oakenfold ft. Brittany Murphy | Faster Kill Pussycat |
| 13 | Tonedef Allstars | Who Do You Think You Are Kidding |
| 14 | Morrissey | The Youngest Was The Most Loved |
| 15 | Stan Boardman | Stan's World Cup Cong |
| 16 | Feeling | Fill My Little World |
| 17 | Primal Sream | Country Girl |
| 18 | Depeche Mode | John The Revelator |
| 19 | Busta Rhymes | Touch It |
| 20 | The Streets | Never Went To Church |

### Billboard

Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Shakira ft. Wyclef Jean | Hips Don't Lie |
| 2 | Chamillionaire ft. Krayzie Bone | Ridin' |
| 3 | Nelly Furtado ft. Timbaland | Promisicuous |
| 4 | Young Joc | It's Goin' Down |
| 5 | Daniel Powter | Bad Day |
| 6 | Fort Minor ft. Holly Brook | Where'd You Go |
| 7 | Rihanna | S.O.S. (Rescue Me) |
| 8 | Cassie | Me & U |
| 9 | Rihanna | SOS |
| 10 | Sean Paul | Temperature |
| 11 | Lil Jon og onnur | Snap You Fingers |
| 12 | Red Hot Chili Peppers | Dani California |
| 13 | The Fray | Over My Head (Cable Car) |
| 14 | Field Mod ft. Ciara | So What |
| 15 | Chris Brown ft. Lil' Wayne | Gimme That |
| 16 | Natasha Bedingfield | Unwritten |
| 17 | T.I. | What You Know |
| 18 | Nick Lachey | What's Left Of Me |
| 19 | Bubba Sparxxx og onnur | Ms. New Booty |
| 20 | Nickelback | Savin' me |

sound

# KYLIE MINOGUE AFTUR Á PALLI

The London Astoria, har Marius spældi GBOB finalu í desember, var karmur fyrstu konsert framførsluna hjá Kylie Minogue, síðan hon fyri 13 mánaðum síðan fekk staðfest bróst krabba. Leygarkvøldið spældi systir Kylie, Dannii Minogue í The London Astoria. Hetta var eitt av sokallaðu G-A-Y kvøldunum, ið javnan verða hildin á spælistaðnum. Talan er um risastórar veitslur fyri samkynd. Kylie, ið er vorðin eitt ikon fyri samkynd kring allan heim, nýtti høvið at fara á pall saman við systir síni. Veitslurómurin var stórur, tí hetta kom heilt óvæntað á nógvu gestirnar. Sambært bretska blaðnum The Sun ljóðaði sera væl hjá Kylie.

*Soleiðis sá Kylie út á palli, áðrenn hon fekk staðfest krabbamein og eftir øllum at døma verður ikki leingið, áðrenn heimurin aftur fer at uppliva yndisligu songkvinnuna soleiðis*





*Boy George tá verst stóð til fyri einum ári síðan*

# BOY GEORGE SUM REGGAE STJØRNA

Ummælarin hjá bretska blaðnum The Independent, var ein av teimum 350 fólkunum, ið vóru við tá Boy George enn einaferð royndi at geva síni yrkisleið sum tónleikara nýtt lív. Seinastu árini hava rúsevnir, porno og løgreglumál merkt yvirskriftirnar um Boy George. Men ummælið, av konsertini við tí nú munandi klænra Boy George, er sera jaligt. Nýggi tónleikastílurin er reggae, og fer so við aftur til stílin í lagnum "Do You Really Want To Hurt Me", sum var hansara upprunaliga gjøgnumbrot. Men hesaferð er tónleikurin ikki bert reggaekendur men gjøgnumført reggae. Løgini fáa eisini sera jalig ummæli, og fleiri verða spádd møguligan hittstatus.

# CHRIS MARTIN DANSAR SUM CROUCH

Chris Martin úr Coldplay er fótbóltsfjeppari og heldur sum vera man við Onglandi, og í mun til restina av Onglandi tykist vónin hjá Martin ikki at liggja í fótinum hjá Wayne Rooney, men í langlimaða Liverpool framherjanum Peter Crouch. Á The Isle of Wight Festivalinum í vikuskiftinum, dansaði Martin tann heilt serliga Peter Crouch dansin, meðan hann sang Get up off your sofa. Get up off your couch. Forget what you're doing, and do the Crouch! meðan bólkurin spældi lagið Don't Panic. Martin greiddi eisini frá, at um Ongland vinnur HM, so ætlar hann sær at skriva ein sang til Peter Crouch, skrivar bretska tíðindablaðið The Sun.



*Chris Martin er sum restin av heiminum bergtikin av serliga Crouch dansinum.*